

Mynd: Marin Teknikk

# Noreg: Skulu byggja eitt kavaraskip fyri meir enn eina milliard krónur

**Jógvan Hugo Gardar**

12.12.2014 - 14:50

Oljan.fo

Tað var orsøk til at fáa bæði kaku og kaffi hjá Marin Teknikk í Herøy í Noregi, tá tey kundu avdúka, at eitt felag í Singapore, Ultra Deep Solutions, hevur bílagt eit stórt serútgjørt skip sum skal brúkast til kavaravirksemi. Skipið kann brúkast til alt kavaravirksemi, millum annað innan oljuvinnuna.

Marin Teknikk hevur farnu árini smíðað fleiri skip sum brúkast í frálandavinnuni, men hendan feska uppgávan er tann størsta og mest krevjandi hjá teimum. Tey ynskja ikki at siga, hvat skipið kostar at byggja, men tað er greitt, at prísurin er oman fyri eina milliard krónur.

Tað fer at taka 30 mánaðir at byggja skipið, og einir 100 verkfrøðingar skulu vera við í tilgongdini.

Skipið skal hava tvær kavaraklokkur, sum skulu kunna arbeiða niður á 300 metra dýpi. Longdin á skipinum verður umleið 143 metrar, tað skal hava tveir kranar og útgerð til tveir mannleysar og fjarstýrdar kavbátar.

Skrokkurin skal byggjast í Shanghai í Kina, og hann kemur so til Noreg í 2017, har hann skal gerast liðugur.

Tað eru bara eini 30 skip av hesum slagnum til í heiminum í dag, og tí ivast keyparin ikki í, at tørvur er á tí.

- Vit rokna við at tað er ein framtíð hjá einum nýmótans skipi av hesum slagnum, ið kann arbeiða á stórum dýpi, sigur stjórin í Ultra Deep Solutions, Sheldon Hutton, ið einum tíðindaskrivi